# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Martin Thomsen.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jóhan Syderbø um evnið »Orð Jesusar á krossinum (4)« og á tilbiðjanarmøtinum talar Jógvan Zachariassen um »Nehemias: maðurin við góðum Gudi«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbliutími, undirvísing um Opinberingina. www.livdin.fo

**Samkoman Rhema**
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC Teens.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Á møtinum verður biðið fyri sjúkum. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Leygarkvøldið bøn í býnum kl. 21.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóhan P. Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Siloakórið luttekur. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Sunnudagin kl. 11 Møti, familjutímin byrjar við drekkamunni aftaná flaggdagsskrúðgonguna kl. 16. Skótarnir skipa fyri.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær. Vak og bið«!

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagur kl. 9.30-12 Foreldur og børn hittast.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti v/ Jákubinu og Kim Hansson.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Rúna Rasmussen »Hvør er Jesus«.
Í morgin kl. 17 Landsbøn, kl. 20 Lovsangskvøld.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Kurt Christensen, kl. 11.50 ABC v/ Jacobinu Jacobsen, evnið: »Dópurin í Heilaga Andanum« 2. partur, kl. 18 Familjumøti.
Mánadagin kl. 17 Bøn, kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting v/ Jóhan Hendrik Hansen.
Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin í Saron.

**Aglow-Føroyar**
Mansstevnan í Libanon, Sørvági byrjar fríggjakvøldið kl. 20.00. Móttøka kl. 19.00.

**Ársmøti í Nesvík**
Ársmøti hjá Heimamissiónini verður 23.-25. apríl í Leguhúsinum í Nesvík og í Ítróttarhøllini á Skála.
**Fríggjadagin 23. í Leguhúsinum:** kl. 19.30 Evnið: »Heimamissiónssøgan« v/ Sverra Steinhólm, Tofta Streingjakór og Ungdómskórið úr Vágum syngja. Kl. 22 Vitniløta, Effata av Strondum syngja.
**Leygardagin í Leguhúsinum:** kl. 10 er evnið: »HM í 100 ár« v/ Hera Tróndheim, Streingjaleikur frá 60-unum. Kl. 14 Frágreiðingar frá arbeiðinum. Kór: Gratia.
**Í Ítróttarhøllini á Skála:** kl. 20 Møti v/ Torleif Johannesen. Evnið: Hvønn dag legði Harrin nøkur afturat. Taborkórið av Toftum og Gleði úr Klaksvík syngja. Kl. 22 Vitniløta. Suðuroyar Gospelkór syngur.
**Sunnudagin í Ítróttarhøllini á Skála:**
Gudstænasta kl. 11, Bergur D. Joensen talar, Suðuroyar Gospelkór syngur. Familjumøti kl. 15, Kristian Martin Petersen talar. Barnakór av Skála og Strondum syngja. Møti kl. 18 v/ Ingolf Johannesen. Evnið: Arbeiðið tykkara er ikki burturspilt í Harranum. VOX og Glyvra Streingjakór syngja. Barnaskrá er fyri børnini leygardagin og sunnudagin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Vegna ársmøti hjá Heimamissiónini í Ítróttarhøllini á Skála, verður einki møti og eingin sunnudagsskúli á Glyvrum sunnudagin.
Bjóða verður til familjumøti á Skála kl. 15 og Møti kl. 18.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 17 TIM 5, kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið Opið hús kl. 21 við Símun Absalonsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Evangel. møti kl. 19. Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Avhaldshúsið í Haldórsvík**
Evangelisk møti verða í Avhaldshúsinum í Haldórsvík leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Herman og Gigga syngja, Tórmund og fleiri luttaka.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Øssur Kjølbro, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri ung.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Aglow, Sandoy**
Aglow møti verður í Samljóð týsdagin kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Bygdarhúsið í Skálavík**
Undir heitinum »Jesus – okkara einasta vón« halda evangelisku møtini í bygdarhúsinum í Skálavík fram í kvøld kl. 20. Í kvøld syngur Maria Andersen. Svenning av Lofti talar. Barnamøti er kl. 17.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Fundur verður leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way. Høvið verður at geva eina gávu til Grønlandsmissión. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 19. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl
**Enn eru nøkur pláss eftir til Norratúrin 2.-10. aug. saman við sandoyingum. Tilmeld. 316491**
***Týsdagur 20. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásøgn, Jákup Lindenskov
***Mikudagur 21. apríl***
kl. 10-12 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson.
kl. 15 Vitja framsýningina í Lítluvík
***Hósdagur 22. apríl***
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14 Fundur fyri pensioneraðum sjúkrasystrum
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 23. apríl***
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14-17 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK APRÍL 2004**

**SKRÁIN VIKA 17–18**

**Listaframsýning við grafiskari list hjá Åse Bømler (FO) er í húsinum til 18. apríl**
**Listaframsýning hjá listamanninum Lennart Iverus (SE) er í húsinum til 18. apríl**
**Framsýningin "Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm**

**Fríggjadagur 23. apríl Kl. 09.00** KT-messa.
**Leygardagur 25. apríl Kl. 14.00-18.00** Flaggdagur. Opið sum sunnudag

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo









## FILMSTEIGURIN

# The Passion of the Christ

## 12 tímar, sum broyttu heimin

Stórfilmurin hjá Mel Gibson um seinasut 12 tímarnar í lívinum hjá Jesusi hevur hesa seinastu tíðina verið bæði for- og baksíðuevni í bløðum kring allan heimin, og longu nú stendur eisini greitt, at talan er um ein av teimum filmum, sum koma at standa heilt ovarliga, tá teljast skal saman, hvussu nógv fólk hava vitjað biohøllirnar.

Filmurin er persónliga tulkingin hjá Mel Gibson um seinastu 12 tímarnar av lívið Jesusar. Grafiskt og visuelt er talan um eina framúrskandi sýning, soleiðis at tað at kalla er óneyðugt við dialogi av nøkrum slag, og er hesin eisini skorin niður til eitt avgjørt minimum.





Talan er um ein sera ógvusligan, og higartil eru nógv fólk fara púra skelkað úr aftur biohøllini. Myndirnar eru kanska ikki tær litríkastu, men tær eru einfaldar og raka púrasta inn á hjartað, soleiðis at ein og hvør skilir týdningin av teimum.

At byrja við var at eingin, sum vildi fíggja hugskotið hjá fimm-falda oscar-vinnaranum, Mel Gibson, men hann er nú heldur ikki hvør sum helst, so hann legði einsamallur á leið 150 mió kr. á borðið, soleiðis at farast kundi undir verkætlanina.

Og tað er einki at ivast í, at hetta nú hevur borið ávøkst. Forsølan av atgongumerkjum sýndi tøl, sum bert Harry Potter og Ringanna Harri kunnu javnsetast við, og hóast skuldsetingarnar eru heglaðar niður úr at kalla øllum ættum, so vilja tey øll kortini síggja filmin.

Og at hetta eisini verður støðan her í Føroyum, man lítil ivi vera um. Mel Gibson hevur enn einaferð sýnt, at hann telist millum avgjørdu elituna, tá filmir skulu skapast.





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 23.04. | kl. $18^{00}$ | Fríggjadagin | 23.04. | kl. $20^{45}$ |
| Fríggjadagin | 23.04. | kl. $23^{30}$ | Leygardagin | 24.04. | kl. $18^{00}$ |
| Leygardagin | 24.04. | kl. $20^{45}$ | Leygardagin | 24.04. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 25.03. | kl. $17^{00}$ | Sunnudagin | 25.03. | kl. $19^{45}$ |
| Sunnudagin | 25.03. | kl. $22^{30}$ | | | |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Fríggjadagin 23.04. kl. $22^{30}$ Leygardagin 24.04. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 25.04. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 23.04. kl. $20^{00}$ Leygardagin 24.04. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 25.04. kl. $19^{15}$




Fríggjadagin 23.04. kl. $17^{30}$ Leygardagin 24.04. kl. $17^{30}$
Sunnudagin 25.04. kl. $16^{30}$

**BIO KIOSKIN**
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.